# Rentubroyting

Við virknaði frá 1. august 2001, lækkar Føroya Sparikassi rentustigini á inn- og útláni. Rentubroytingin er eitt úrslit av, at rentustøðið í Danmark er lækkað seinasta hálva árið.

Eftir hækkingina verða høvuðsrentustigini hesi:

| **Innlán** | **% p.a.** |
|---|---|
| Vanlig konto: | 0,10 |
| 3. mðr. uppsøgn: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 3,50 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 4,00 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 4,50 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 4,75 |
| Ábyrgdarakonto: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 4,00 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 4,50 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 4,75 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 5,00 |
| 12. mðr. uppsøgn: | |
| - saldo 0 - 100.000 | 3,75 |
| - saldo 100.000 - 300.000 | 4,25 |
| - saldo 300.000 - 1.000.000 | 4,75 |
| - saldo yvir 1.000.000 | 5,00 |
| Bassakonto: | 5,00 |
| PlussKort konto: | 3,50 |
| PlussSpar konto: | 4,50 + 0,5 |
| Bústaðarkonto: (+ 3,0% frá Føroya Landsstýri) | 4,00 |
| Luta- og kapitaleftirløn: | 5,50 |

| **Útlán** | |
|---|---|
| Sethús 1. veðrættur | 6,00 - 6,25% p.a. |
| 2. veðrættur | 8,75 - 9,50% p.a. |
| Billán: | |
| Alt eftir útgjaldi og trygd | 6,50 - 8,50% p.a. |

Postboks 34
FO-110 Tórshavn
Tlf. 348000, Fax. 348400
FØROYA SPARIKASSI



# Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur fyri psoriasis verður á Bláa Lónið í Íslandi 7. sept. og heim aftur 4 vikur seinni.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, fara til egnan kommunulækna, læknin fyllir umsóknarblaðið út og sendir tað til húðlæknan.

Umsókn skal latast inn seinast 10. august 2001. Eru ivamál hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja 424179.

*Vinarliga*

**Føroya Psoriasisfelag**



# Leyst starv

Varðaleiðari til handilin í Vágum søkist at seta skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Uppgávurnar eru:
- At halda handilin á einum høgum støði.
- Dagligu ábyrgdina av einum nøktandi handli hjá viðskiftafólkinum.
- Avloysari hjá deildarleiðaranum.
- Eisini eru møguleikar fyri framtíðar avbjóðingum.
- At royna evni og hugflog í einum spennandi umhvørvi.

Løn sambært avtalu.

Áhugað kunnu venda sær til Álv Samuelsen, deildarleiðara, tlf. 332950.

Skrivlig umsókn skal sendast til

**FK Vágar**
370 Miðvágur
att.: Álvur Samuelsen
Keypssamtøkan í Vágum



# Summarfrí

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá 07. august til 27. august, báðir dagar íroknaðir.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**



# Starv á Statoil-støðini í Sørvági

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til Statoil-støðina. Arbeitt verður í vaktum.

Meira fæst at vita um arbeiðið við at tosa við Martin.

**Handilsvirkið Niclasen**
Tlf. 332001



# MANNING

Hervið verður søkt eftir
**manning**
til M/F Norrönu,
at byrja beinanvegin



Størvini, ið sett verða, umfata flestu deildir innan catering so sum:

Sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.

Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 345900 ella 345924 og spyr eftir Andrias.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn



# Summarfrí

Stongt er til 20.08.01.

**Kliniskur tannteknikari**
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík, Tlf. 448480



# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

## 620 Runavík

**Søkir:**

Avloysara fyri **sjúkrasystir 0,7 tíð** at byrja 01.09.01.

Løn og setanarviðurskifti sambært avtalu við Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Setunartíðin er til 31.12.01.

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum á tlf. 448185 ella 448201.

Umsókn saman við prógvi, viðmæli v.m. skal sendast til heimið í seinasta lagi 15.08.01.



Til handlarnar við Hoyvíksvegin og Gripsvegin verður søkt eftir fyrikomandi

# Ekspeditrisu

Arbeiðið fevnir um skiftandi vaktir uml. 30 tímar um vikuna.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Andreu.

BAKARÍIÐ
HJÁ GUNLEIVI
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61




# Verður trupult at fáa roknistykkið at ganga upp

**Landsstýrið hevur samtykt at byggja nýtt skip til sigling til Suðuroyar. Strandferðslan arbeiðir í løtuni víðari við málinum. Bjarni Djurholm, landstýrismaður, skal royna at fáa løgtingið at samtykkja eitt skip, sum kostar 305 milliónir, ístaðin fyri 240 milliónir. Eitt skip, sum pláss ikki er fyri við verandi íløgulofti og sum tí er ein trupulleiki av politiskum slag**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*



- Tingið skal samtykkja at byggja, eg hevði nær sagt, eitt annað skip, sigur Bjarni Djurholm, tá fregnast verður eftir, hvar málið um nýtt suðuroyarskip flýtur og hvussu hetta hongur samn við samlaðu íløgunum og raðfestingunum.

Hann sipar til, at hann sjálvur átti uppskot um skip fyri 240 milliónir, men at samtykta ætlan landsstýrisins ljóðar uppá 305 milliónir.

*Samanlagt snýr tað seg um 380 milliónir, sum eg skal hava tilsøgn til úr løgtinginum, sigur Bjarni Djurholm, ið metir, at málið um skip til suðuroyarsigling er eitt mál, ið má loysast politiskt, tí rúm er ikki innan verandi karmar*

## Kunning

- Landsstýrið hevur samtykt ætlanina og í løtuni fer budgetering fram og arbeiðið verður væntandi boðið út í næstum. Almenn kunng verður um ætlanina, t.d. í Suðuroynni, eins og kunning verður fyri løgtingslimum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

- Skipið er størri og dýrari, enn eg skeyt upp. Talan er um 305 milliónir ístaðin fyri 240 milliónir. Men peningurin, ið er avsettur í inniverandi árið, verður ikki brúktur, men stendur. Vit hava so eisini 100 milliónir árliga tey 3 komandi árini, sigur Bjarni Djurholm, ið væntar, at kjølurin verður strekur innan alt ov langa tíð.

Løgtingið skal góðtaka

Men Bjarni Djurholm er greiðir yvir, at løgtingið skal samtykkja eina størri ætlan, enn hann hevði ætlað at byrja við.

- Har umframt má so eisini okkurt gerast viðvíkjandi samferðsluhavn. Hetta eru einar 75 milliónir krónur. Samanlagt snýr tað seg um 380 milliónir, sum eg skal hava tilsøgn til úr løgtinginum, sigur Bjarni Djurholm.

- Tingið skal samtykkja at byggja, eg hevði nær sagt, eitt annað skip, sigur Bjarni Djurholm.

## Trupult roknistykki

Tað hevur verið frammi, at trupult verður at fáa øll ynski og ætlanir at hóska, tí eitt íløguloft er.

- Trupulleikin hjá okkum er, at vit hava eitt íløguloft. Vinnumálastýrið hevur umleið helvtina av teimum arbeiðum, sum skulu í gongd, at ráða yvir. Tað eru vegir og annað. Vit hava ikki meira, enn vit hava havt, at ráða yvir, sigur Bjarni Djurholm og leggur afturat, at hann kann bert nýta peningin einaferð, ikki tvær ferðir!

- Tað verður trupult at fáa roknistykki at ganga upp, sigur Bjari Djurholm.

## Politiskur trupulleiki

Bjarni Djurholm vísir á, at hann ger tað, ið hann skal gera, men at støðan er trupul, er eingin ivi um, tí raðfestingar, ætlanir og íløguloft tykjast ikki at sampakka.

- Tað er ikki pláss í verandi karmi. Hetta er ein serstøk íløga, og skal málið loysast, so skal støða takast politiskt, sigur Bjarni Djurholm, ið minnir á, at suðuroyarskipið er ikki nøkur jolla, men eitt skip, ið er bæði longri og breiðari enn Norrøna.

# Pensjónmálið skal loysast í hesi tingsetuni

**Pensjónsmálið hevur verið nógv frammi seinastu tíðina og eisini nú, løgmansrøða hevur verið. Sámal Petur í Grund sigur, at málið stendur frammaliga og at semja er um, at málið skal gjøgnumførast og loysast í hesi tingsetuni**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*

Pensjónmálið er aktuelt. Tað hevur verið nógv og leingi frammi og fekk aftur luft undir veingirnar, nú løgmansrøða var. Málið hevur ligið longi og røddir hava verið frammi, ið hava verið sera ónøgdar við gongdina.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, sigur, at málið hevur ligið leingi. Politisk ósemja hevur verið og samstarvið hevur verið nervað. Fólk eru komin og farin, eisini innan umsitingina.

Sámal Petur í Grund hevur alment sagt, at hann og løgmaður eru samdir um, hvussu málið skal loysast, men ikki verið nærri inni á, hvussu hetta skal gerast.

## Samdir

- Vit eru samdir um lógartekstin og arbeiðsgongd. Vit eru samdir um, at málið skal gjøgnumførast, sigur Sámal Petur í Grund.

- Men málið skal til hoyringar og síðani mugu vit taka politiska bardagan, sigur Sámal Petur í Grund.

Hann dugir tó ikki neyvt at siga, nær málið kann væntast loyst.

- Fíggjarmálastýrið hevur eisini arbeitt við málinum og fólkini har hava verið nógv upptikin av sáttmálasamráðingum og øðrum. Vit hava valt at lata tey arbeiða við málinum, í staðin fyri at seta nýggja arbeiðsorku av til arbeiðið, sigur Sámal Petur í Grund.

Hann ger vart við, at málið er frammaliga í raðfestingini, meira, enn fólk geva sær far um.

- Tað er umráðandi at fáa pensjónsviðurskiftini hjá fólki okkara á pláss, tí hetta er eisini ein stabiliserandi faktorur í samfelagnum, sigur Sámal Petur í Grund.

- Málið skal loysast í hesi tingsetuni. Tað hava vit sett okkum fyri, sigur Sámal Petur í Grund.


